# Styttri arbeiðsvika er ein politisk raðfesting

Vælferðin í vesturheiminum er vaksin nógv síðstu nógvu árini. Mynd 1 vísur gongdina í BTÚ fyri hvønn íbúgva í útvaldum londum í vesturheiminum í tíðarskeiðinum 1972-2021. Felags fyri hesi lond er, at úrtøkan er meir enn tvífaldað hetta tíðarskeiðið, ið merkir, at búfjøldin í vesturheiminum er vorðin ríkari hesi seinastu 50 árini.

**Gongdin í BTÚ per íbúgva í útvaldum londum, 1972-2021 (Indeks: 1972=100)** **Mynd 1**




**Kelda:** Heimsbankin (World Bank)

So hvørt sum londini eru vorðin ríkari, hava húskini valt at veksla ein part av vøkstrinum í vælferðini um við meira frítíð, tá arbeiðsfjøldin hevur valt at samráða seg til styttri arbeiðsviku. Hetta er eitt áhaldandi rák, eisini í Føroyum.

Politiska skipanin hevur nú ætlanir um at stytta arbeiðsvikuna frá 40 tímum niður í 37 tíma arbeiðsviku.

## Stytt arbeiðsvika merkir meirkostnaður á áleið 8%

Alt annað líka merkir uppskotið um stytta arbeiðsviku úr 40 tímum niður í 37 tímar ein meirkostnað á áleið 8%.[1]

Hesin meirkostnaður kemst av, at lønmóttakari eftir ætlan skal hava somu løn, hóast arbeiðsvikan verður stytt.

Gjaldstovan, sum umsitur allar lønarútgjaldingarnar hjá landinum og hjá eldrasamstørvunum, hevur roknað út kostnaðin av, at arbeiðsvikan verður stytt tríggjar tímar frá 40 tímum niður í 37 tímar. Um alt annað er óbroytt (tað vil siga ongar effektiviseringar, ongar broytingar í arbeiðsgongdum og manning. Hvør einasti tími, sum varð arbeiddur og løntur í 2022, við 40 tíma arbeiðsviku, verður eisini arbeiddur og løntur við 37 tíma arbeiðsviku) so merkir henda stytting av arbeiðsvikuni eitt økt útgjald á 243 mió. kr., og at 444 fleiri ársverk vera neyðug fyri stovnar hjá landinum og fyri tey 7 eldrasamstørvini (Tórshavnar kommuna er ikki við her).

Í hesi útrokning eru allar lønir, pensjónir og arbeiðsmarknaðargjøld íroknað, tó eru lønarútreiðslurnar til tænastumannapensjónir ikki við, tí hesar ikki verða broyttar av hesum. Hugt er niður í allar sáttmálar hjá landinum, tí sáttmálarnir hava ymisk krøv til tímatal um vikuna, og har út frá er so roknaður ein faktorur fyri hvønn sáttmála. Til dømis um sáttmálin sigur 39 tímar, og arbeiðsvikan verður stytt til 37 tímar, so er brøkurin (39-37)/37 = 0,05. Hesin faktorur er síðani faldaður við samlaðu lønargjaldingunum fyri hendan sáttmálan og so lagdur afturat samlaðu lønargjaldingunum áðrenn arbeiðsvikan verður stytt.

Tal av ársverkum er roknað soleiðis. Tú tekur verandi ársverk, hjá til dømis Prestafelagnum eru talan um 21,7 ársverk. Hetta verður faldað við tímunum í arbeiðsvikuni hjá teimum, sum í løtuni er 39,5 tímar. Hetta verður so broytt til 37 tímar, og síðani verður roknað út, hvussu nógv ársverk skulu afturat, um arbeiðast skal sama tímatal, sum áðrenn broytingina. Eitt nú arbeiða flestu lærarar fulla tíð, tí vil ein stytt arbeiðsvika hjá teimum krevja 58 fleiri ársverk.

Hetta roknistykkið er gjørt út frá eini "alt annað líkað"-fortreyt. Ein styttri arbeiðsvika vil ávirka arbeiðsøkir ymisk. Á til dømis sjúkrahúsum, á bústovnum innan Almannaverkið og manning á skipum skulu fleiri fólk setast, tí har er neyðugt við manning 24/7, tað vil siga dag og nátt allar dagar í vikuni. Innan onnur økir, so sum umsiting, ber møguliga til at umleggja arbeiðsgongdina, so til ber at fáa nærum sama framleidni, hóast arbeiðsvikan verður stytt. Og fyri tímalønt – har er tað sannlíkt, at tey framhaldandi arbeiða sama tímatal.

So talið 243 mió. kr. er sannlíkt nakað minni (eisini tí nakað av hesum kemur inn aftur sum skatta- og MVG-inntøka) og somuleiðis tey 444 ársverkini hjá landi og eldrasamstørvunum.

---

[1] Broyting í arbeiðstíð: $\left(\frac{37}{40} - 1\right) * 100 = -7{,}5\%$. Meirkostnaður: $\left(\frac{40}{37} - 1\right) * 100 \cong 8{,}1\%$

Men óansæð, so er avleiðingin ein øktur kostnaður og ein tørvur á fleiri ársverkum (starvsfólkum).

Her er ikki mett um møguligu jaligu avleiðingarnar av styttri arbeiðsviku fyri arbeiðsútboðið. At ein stytt arbeiðsvika kann gera tað áhugavert hjá nøkrum at arbeiða, sum ikki arbeiða í dag – sum harvið vil økja um arbeiðsútboðið. Eitt nú kann hugsast, at tað eru útbúgvin fólk innan umsorganarøkið, sum ikki hava umstøður at taka vaktir svarandi til fulla tíð, men kunnu fáa tað at ganga upp við eini styttri arbeiðsviku.

Ein styttri arbeiðsvika vil eisini ávirka í privata og kommunala geiranum. Har manning skal vera, er neyðugt at manna upp við fólki. Har tað ikki er neyðugt, er ávirkanin á kostnaðin treytað av, um arbeiðið, sum verður gjørt, ber til at leggja soleiðis til rættis, at framleidnið veksur, soleiðis at tú fært tað sama fyri 37 tímar sum fyri 40 tímar. Tað kann kanska vera at tað ber til í summum førum, men givið ikki alla staðni. Ein stytting av arbeiðsvikuni vil føra við sær eina munandi kostnaðarøking í privatu vinnuni, og privata vinnan kann ikki, eins og tað almenna, mótrokna í kostnaðinum við meira skattainntøkum.

Yvirskipað roknað eru vit tilsamans um 28.000 løntakarar í Føroyum í løtuni[2]. Umroknað til fulltíðarstørv er talið mett at vera 24.000 løntakarar. Um vit lækka arbeiðstíðina úr 40 tímum niður í 37 tímar so er hetta ein lækking á 7,5%. 7,5% av 24.000 hesum gevur 1.800 størv, og sostatt fer føroyski arbeiðsmarknaðurin at mangla 1.800 fulltíðarstarvsfólk, um vit stytta arbeiðstíðina við 3 tímum.

Um vit fáa nóg nógv ung út á arbeiðsmarknaðin, kundu tey fylt hesi størv.

Tað eru tó eingi útlit fyri at so verður. Í árunum 2023 til 2030 koma í miðal 750 fólk út á arbeiðsmarknaðin um árið, men samstundis verða 600 fólk pensjónistar um árið. Tí er nettotilgongdin til føroyska arbeiðsmarknaðin bert 150 fólk um árið. Um privati arbeiðsmarknaðurin tekur helvtina av hesi tilgongd, so fær tað almenna bert 75 fólk av hesi nettotilgond um árið. Tilgongdin til arbeiðsmarknaðin er tí alt ov lítil til at bøta um starvsfólkatrotið. Harafturat hava føroyingar eina høga luttøku á 91%[3] á arbeiðsmarknaðinum í forvegin.

Leggjast skal afturat, at eitt arbeiðsloysi á 0,7% merkir, at vit longu nú mangla nøkur hundrað starvsfólk í føroyska búskapinum. Eitt arbeiðsloysi á 0,7% merkir veruliga, at Føroyar einki arbeiðsloysi hava, og at tað vantar starvfólk. Vanligt er, at rokna 2% sum einki arbeiðsloysi, tí tað altíð er eitt skiftisarbeiðsloysi. Samanumtikið førir ein lækking av arbeiðstíðini til eitt stórt starvsfólkatrot, sum fer at gera, at týðandi almennar tænastur ikki fáa størvini mannaði.

---

[2] Kelda: Hagstovan
[3] Kelda: Hagstovan

Vit vita hvørji størv minst áhugi er fyri, og tað eru røktarstørv. Vit mugu tí rokna við, at nógv røktarstørv fara at vera ósett komandi árini.

**Samanumtøka**

Tað er eyðsæð, at ein styttri arbeiðsvika kemur at krevja bæði meira pening og fleiri hendur; nakað sum longu nú er ein avbjóðing fyri føroyska búskapin.

Stórt arbeiðstrot er longu nú í Føroyum, og fer tað at veksa í komandi tíðum, sí frágreiðing frá Búskaparráðnum frá mai 2021. At stytta arbeiðsvikuna kemur tí at økja enn meira um verandi trýst á arbeiðsmarknaðinum. Tað er ikki búskaparliga skilagott. Best er at minka um tey trýst, sum eru í búskapinum.

Harafturat kemur uppskotið at økja munandi um lønarkostnaðin í vinnuni og í almenna geiranum, og verður tað soleiðis við til at gera fíggjarpolitiska haldførið uppaftur verri.

Soleiðis sum gongdin hevur verið í føroyska samfelagnum seinnu árini og útlitini til vaksandi starvsfólkatrot innan fleiri økir, so er samfelagsbúskaparligi tørvurin ikki, at vit arbeiða minni, men heldur at vit arbeiða meira.

Spurningurin kann tí setast við, um hetta er rætta løtan at lækka arbeiðsvikuna frá 40 til 37 tíma arbeiðsviku.

Tað ber til at gera eina lækking av arbeiðstíðini, um politisku myndugleikarnir ynskja tað. Í so fall er neyðugt, at politiski myndugleikin samstundis finnur fígging til endamálið, tí tað er ikki ókeypis. Og sum samfelag mugu vit tá eisini finna aðrar loysnir á vaksandi starvsfólkatrotinum.

Fróði Magnussen, formaður í Búskaparráðnum